H71-StÍF 28-27 (13-16):

# Tveittu sigurin burtur




*Hesa ferð vóru mongu málini frá m.ø. Bjarna nóg mikið til sigurin, men H71 kann ikki rokna við, at tað hvørja er nóg mikið, at liðið bert hevur góðar skjúttar*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**H71 vann ein tepran sigur á StÍF, og styrkti har við um støðu sína á stigatalvuni, men strandingar munnu framvegis iðra seg um, at tað ikki eydnaðist teimum at binda fyri, tá teir tóktust hava alt í sekkinum. Hoyvíkingar eiga tó rós uppiborið fyri stríðsviljan, sum gav teimum stigini**

HONDBÓLTUR - MENN
*Jákup Mørk*

Leingi var tað sera lítið, sum bendi á, at tað skuldu gerast hoyvíkingar, sum fóru av stað við sigrinum, tá teir leygardagin dystaðust móti StÍF í Ítróttarhøllini á Hálsi í Havn.

Stigatalvan segði undan dystinum, at talan var um tvey sera jøvn lið, og tó at munurin ígjøgnum dystin ikki var tann stóri, so tóktust gestirnir tó at hava takið megin partin av tíðini.

### StÍF sá betri út

Eftir eina heldur varliga byrjan, har liðini bæði lika sum meddaðu seg inn á hvørt annað, settu strandingar ferð á. Fleiri ferðir spældu teir seg væl ígjøgnum verjuna hjá heimaliðnum, og ikki minst er tað ein stórur styrkur hjá liðnum, at trupulleikin við strikuspælinum nú tykist at vera loystur. Hetta hevur annars verið ein trupulleiki, eftir at Sveinbjørn Danielsen gavst við hondbóltinum, men sum Bent Djurhuus hevur spælt teir báðar seinastu dystirnar, so er StÍF við at finna vanligu styrkina aftur á hesum øki. Bent hevur annars stríðst við Jón Rasmussen um plássið hetta kappingarárið, men leygardagin slapp hesin so at siga als ikki upp í part í spælinum.

Góða strikuspælið viðførdi so aftur, at hoyvíkingar ikki tordu at satsa ov nógv frameftir í verjuni, og hetta gav leikandi StÍF-venjaranum, Costin Dumitrescu, góðar umstøður at vísa skotstyrki sína, og so gjørdist tað sera trupult hesa løtuna hjá hoyvíkingunum.

Ikki tí, hoyvíkingar hava so sanniliga eisini góðar skjúttar á sínum liði, men serstakliga í fyrra hálvleiki var merkisvert, hvussu lítið teir fingu burtur úr hesum. Við tveimum somikið skotsterkum leikarum sum Bjarna Wardum og Halgir Dahl-Olesen, eigur liðið at kunna leggja trýst á mótstøðuverjuna, so betri pláss verður hjá øðrum leikarum, men hetta hendi so at siga ikki fyrsta hálva tíman. Nakrar einstakar ferðir varð rúm skapt fyri Kristjani Petursson, men annars komu flestu málini hjá hoyvíkingum í fyrra hálvleiki eftir einmansavrik.



*Ein av nýggju monnunum hjá H71 er Kritstjan Petursson, og her hevur hann gott tak á einum av gomlu liðfeløgunum sínum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Tóku av møguleikanum

Hóast munurin bert var trý mál í hálvleikinum, so hevði tú tá varhugan av, at strandingar helst fóru at koyra sigurin heim. Tað vóru teir, sum høvdu sýnt betra spælið á vøllinum, og teir tóktust eisini hava størra yvirskotið til at seta ferðina upp, um hetta skuldi gjørst neyðugt.

Hoyvíkingar royndu tó frá byrjan av seinna hálvleiki at seta meira trýst á StÍF. Eina løtu sá hetta eisini út til at eydnast, og hoyvíkingar vunnu seg eisini upp á javnt, men so vendi aftur.

Strandingar fingu fatur á skjúttunum hjá H71. Fingu órógvað álopsspælið, og brádliga fór alt aftur at líkjast einum útisigri. Úr støðuni, 20-20, vunnu teir seg upp á 25-21, og alt sá at kalla púra vónleyst út hjá heimaliðnum, tá teir brádliga fingu ein heldur óvæntaðan møguleika. Fyrst varð Bent útvístur, og tá so dómararnir nakað seinni mettu at nýtti dekan ov nógva tíð um at lata bóltin frá sær eftir álopsfeil, fekk hann tveir minuttir á beinkinum.

Yvirtalið nýttu hoyvíkingar til at vinna seg upp á 24-25, og tó at teir misnýttu brotskast, tá teir høvdu at javna, so gav hetta teimum trúnna aftur.

Teir stríddust sum úlvur á skóg í bæði verju og álopi, og ikki ein gongd útvísingin av Johnny Djurhuus gjørdi mun í so máta. Hinvegin tóktist tað avgerandi fyri strandingar, at Leivur Justinussen fekk eina óneyðuga útvísing í næst seinasta álopinum hjá hoyvíkingum. Vertirnir gjørdu sær eisini dælt av hesum, og við tveimum málum frá Halgiri vendu teir alt á høvdinum í seinasta minuttinum. Til stuttleikar kann nevnast, at tá Halgir skeyt seinasta málið í dystinum, var tað fyrstu ferð í 55 minuttir, at H71 var á odda í dystinum.

### Sálarligi týdningurin

Fyri strandingar mundi tapið kennast sera tungt at bera. Teir høvdu allar møguleikar at avgera dystin, men hinvegin er hetta aftur eitt dømi um, at liðið ikki er nóg støðugt í avrikunum. Skulu heiðursmerki vinnast, so hjálpir tað lítið at vinna sær stig móti oddinum, fyri síðani at tveita tað burtur móti hinum liðunum í deildini.

Møguleikarnir eru so avgjørt til staðar til at skapa nakað stórt við liðnum, og kanska kunnu teir enn eina ferð gera um seg í steypakappingini, men í landskappingi verða teir helst enn eina ferð ov stuttir.

Hjá hoyvíkingum var sigurin fyrst og fremst ein staðfesting av, at tað loysir seg at stríðast til seinasta minutt, og ikki minst man hetta vera týdningarmikið sálarliga. Ístaðin fyri at tapa dystirnar í evstu løtu - sum teir so ofta hava roynt - so hava teir nú tvær ferðir á rað avgjørt í seinastu minuttunum, soleiðis at leikararnir nú kenna, at teir kunnu koppa marginalunum til egnan fyrimun.

Sum nevnt áður, so er tað merkisvert, at H71 ikki fær størri nyttu burtur úr stóru skjúttunum, á tann hátt, at pláss verður skapt fyri hinum leikarunum á liðnum. Tað sigur eitt sindur um spæl teirra, at av teimum 15 málunum í seinna hálvleiki stóðu Bjarni og Hallgir fyri teimum 11, og hetta er nakað, sum eigur at betrast, um liðið skal røkka hægri. Tað kann í øllum førum ikki roknast við, at teir hvørja ferð skulu raka eins væl, sum teir gjørdu seinasta korterið leygardagin, og tá má og skal liðið hava aðrar streingir at spæla uppá, um VÍF og Neistin skulu hóttast. Hinvegin er tað sjálvsagt ein styrkur, at liðið hevur leikarar, sum á slíkan hátt kunnu taka málið í egnar hendur, men í longdini er hetta neyvan nóg mikið.

### Dysturin í tølum

**H71-StÍF 28-27 (13-16)**

Málskjúttar:
H71: Halgir Dahl-Olesen 9(2), Bjarni Wardum 8, Kristjan Petursson 4, Finnur Hansson 3, Peter Rosbach 2, Anfinn N. Debess, Johnny Durhuus 1
StÍF: Costin Dumitrescu 9(3), André F. Danielsen 5, Marius Joensen 4, Bent Djurhuus 3, Artur Johansen 3, Alexandur Johansen 1, Anfinnur Joensen 1, Leivur Justinussen 1
Brotskøst: H71 5, StÍF 3
Útvísingar: H71 2, StÍF 5
Dómarar úr Neistanum/Kyndli: Kristian Johansen & Hannis Wardum. Høvdu tak á tí mesta, men kundu í einstøkum førum verið meira konsekventir.



VÍF-KÍF 31-26 (18-16):

# Hálvsovandi meistarar

**Tá saman um kom, so vunnu føroyameistararnir ein hampuliga tryggan sigur á KÍF, men eina løtu var líkt til, at gáloysni kundi kostað teimum dýrt**

HONDBÓLTUR – MENN
*Jákup Mørk*

VÍF var stórfavorittur, tá teir sunnudagin tóku ímóti grannunum úr KÍF. Talan var um dyst millum verandi meistararnar og eitt lið, sum seinnu árini hevur livað niðarliga á stigatalvuni, og mett eftir dystunum higartil í ár, so skuldi alt talað fyri einum tryggum heimasigri.

Hóast úrslitini ikki hava verið nakað serlig hjá kollfirðingum seinastu tíðina, so hevur ofta restað lítið í, áðrenn ein sensatión kundi skapast, so vestmenningar vóru ávaraðir um, at teir ikki skulud taka alt ov lætt upp á uppgávuna.



*Tað var fyrst og fremst einmansavrikið hjá Áka Olsen, sum tryggjaði vestmenningum sigurin sunnudagin*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Dølskir meistarar

Hóast hesa ávaring, so hekk tað leingi í luftini sunnudagin, at KÍF kundi gera okkurt heilt óvæntað, tí fyrstu fimm sættapartarnar av dystinum høvdu teir eitt sera gott tak á vertunum.

At KÍF var somikið væl við, komst serstakliga av tveimum lutum. Annar var, at vestmenningar als ikki tóktust vera nóg væl tendraðir. Hin var, at kollfirðingar í nógv størri mun enn áður royndu at gera álopsspælið so fjøltáttað sum gjørligt. Heldur enn alla tíðina at lata útlendsku leikararnir krossa, vórðu bæði strika og vongspælararnir tiknir við í spælið, og tá VÍF-verjan als ikki var nóg vakin til hetta, gjørdist trupulleikararnir nógv størri enn neyðugt, og at Óla Christian Djurhuus so eisini hevði ein av sínum góðu døgum, gjørdi ikki á nakran hátt støðuna betri.

### Áki var bjargingin

Somikið stórir vóru trupulleikarnir hjá VÍF, at var tað ikki fyri ein einstakan leikara, so er væl hugsandi, at sigurin hevði verið í heilt álvarsligum vanda.

Áki Olsen hevur ikki spælt so nógv í ár vegna skaða, men sunnudagin prógvaði hann aftur, hví hann verður mettur sum ein hin vandamesti álopsleikarin í landinum.

Serstakliga fyrsta korterið av seinna hálvleiki var týdningur hansara ovurstórur, tí meðan Óla Christian og verjuleikarar hansara í felag tóktust hava takið á øllum hinum vestmenningunum, so funnu teir ikki út av, hvussu teir skuldu bera eg at við at steðga yngra Olsen-beiggjanum. Kanón kúlurnar fóru mest sum hvørja ferð sendandi í meskarnar, og hetta gjørdi, at meistararnir ongan tíð komu aftur um kollfirðingarnar, hóast eyðsýndu trupulleikarnir við at fáa spælið at hanga saman.

At enda komu so viðleikararnir hjá Áka eisini so dánt ígongd, og tá var ikki so nógv ,sum kollfirðingar kundu gera. Óla Christian fekk ikki einsamallur hildið øllum úti, og tá munurin fyrst var komin upp í eini fýra fimm mál, var alt í roynd og veru avgjørt.

### Vanliga tosið

Dysturin víst enn einaferð, at kollfirðingar als ikki skulu takast ov lætt, men hinvegin fingu teir heldur ikki hesa ferð nakra úrtøku burtur úr stríðnum.

Ein óvæntaður sigur móti onkrum av ovaru liðunum er kanska ikki so langt burturi, um metast skal eftir spælinum. Tað skerst tó ikki burtur, at heldur liðið á fram við at tapa hesar tøttu dystirnar, so missa leikararnir trúnna uppá, at tað kann lata seg gera at vinna slíkar dystir, og tá verður tað ómetaliga trupult, líka mikið hvussu góðar støðurnar í dystinum eru.

Hjá vestmenningum er støðan nærum hin øvugta. Tað er jú leikluturin hjá einum oddaliði, at tað eisini kann vinna, tá spælið ikki er av tí besta, og í longdini eru tað jú stigini sum telja.

Tað hoyrir sjálvandi við, at liðið hevur leikarar, sum einsamallir kunnu taka ábyrgd á seg, og soleiðis mest sum avgera dystirnar. Hesa ferð var tað Áki, sum bar gullið av heiði, men hann er so langt ífrá einasti leikarin, sum er førur fyri hesum, og tí vilja vestmenningar nærum altíð draga longra stráðið í slíkum. Kvalitetirnir á liðnum eru snøgt sagt ov eyðsýndir til, at óneyðug stig verða tveitt burtur í oddastríðnum.

### Dysturin í tølum

**VÍF-KÍF 31-26 (18-16):**

Málskjúttar:
VÍF: Áki Olsen 14(1), Sámal Joensen 5, Johnny Joensen 3, Rógvi Nielsen 2, Harald Bjørgvin 2, Agnar Jeonsen 2, Ingi Olsen 2, Ragnar Zachariasen 1
KÍF: Iljan Topic 7, Kristian Madsen 5, Dorica Tomic 5(2), Petur Martin Poulsen 4, Jákup Dam 3(1), Regin Petersen 2
Brotskøst: VÍF 2, KÍF 3
Útvísingar: VÍF 2, KÍF 5
Dómarar úr Kyndli: Hannis Wardum & Uni Wardum. Hildu alla tíðina eina greiða linju, sum eisini hevði við sær, at dysturi ongan tíð gjørdist ófantaligur.

# Tað verður torført

**UEFA hevur endaliga gjørt av, at talan verður um 10 bólkar í EM-undankappingini, tað ger okkara møguleikar minni**

EM-UNDANKAPPING
*Jákup Mørk*

Nógv hevur verið tosað og gitt um, hvussu styrkismetingin til komandi EM-undankappingina fer at verða.

Ymsir møguleikar hava verið nevndir, men fríggjadagin boðaði boðaði UEFA so endaliga frá, hvussu farast skal fram.

### Torført hjá Føroyum

Tíverri fyri Føroyar hevur altjóða fótbóltssamgongan gjørt av, at liðini verða býtt í 10 bólkar við fimm liðum í hvørjum.

Í hesum er føroyar í niðasta styrkislagnum, og tað merkir so, at vit ikki fáa møguleikan at hitta onkrar av veikastu europeisku fótbóltstjóðunum, soleiðis sum annars hava havt møguleika til, tá talan hevur verið um níggju bólkar.

Umframt Føroyar, eru tey níggju liðini í veikasta bólkinum, Armenia, Moldova, Albania, Aserbajdsjan, Liechtenstein, San Marino, Malta, Luxembourg og Andorra

### Sjeyndu ferð

So er bert eftir at vóna, at Føroyar hesa ferð kunnu sleppa at hitta onkra av veruliga stóru fótbóltstjóðunum. Í teimum seks undanfarnu kappingunum, hava vit enn ikki havt møguleikan at spæla móti londum sum Ongland, Italia ella Týsklandi, og ikki minst fyri pengakassan hjá FSF hevur tað verið dyggur smeitur, at sterkastu liðini Ístaðin hava verið Russland, Kekkia, Rumenia og Jugoslavia, men hvør veit.

Niðanfyri verða londini í ymsu styrkisbólkunum reksaði upp, og koma Føroyar í bólk við eitt land úr hvørjum styrkisbólki. Sjálvt lutakastið fer fram hin 25. januar.

Lag 1: Frakland, Svøríki, Spania, Kekkia, Týskland, Rumenia, Italia, Belgia og Turkaland.

Lag 2: Russland, Kroatia, Danmark, Holland, Jugoslavia, Poland, Ongland, Slovenia, Ukraina og Skotland

Lag 3: Eysturríki, Noreg, Slovakia, Ísrael, Sveis, Ísland, Bulgaria, Finnland, Grikkaland og Ungarn

Lag 4: Kypern, Bosnia-Herzegovina, Hvítarussland, Wales, Estland, Letland, Norðurírland, Georgia, Makedonia og Litava.



*Styrkismetingin til komandi EM-undakapping er nú gjørd, og so verður spennandi, um vit hesa ferð fáa okkurt av teimum heilt stóru londunum*